

**Við Sosialinum í Kroatia**



Síða 15

tíðinda
sosialurin
blaðið

7,-

Nr. 164 ★ mikudagur 1. september 1993

*Landsstýrið leggur uppskot fyri tingið:*

# Startskot til oljuleiting



*Marita Petersen, løgmaður skjøtil á oljuvinnu*

*Marita Petersen, løgmaður hevur nú lagt uppskot fyri tingið um at fáa heimild til at loyva oljukanningum undir Føroyum. Hetta hendir um somu tíð sum trý útlendsk rannsóknarskip gera oljukanningar tætt upp at føroyskum øki.*



*Enn koma bert vatndropar úr borholinum í Lopra Men nú sær ikki mætari út enn at landsstýrið vil hava oljuna at renna Mynd Rógvi Johansen*

Síða 3

# 800 fólk til arbeiðis í Fiskavirking



*Føroya Fiskavirking leggur til brots um ein mánað. Helst verða eini 19 virki við í felagnum. Men bert ein partur av hesum - møguliga umleið ein helvt - fer at vera opin frá byrjan. Tilsamans 700 til 800 fólk fara at arbeiða hjá nýggja móðurfelagnum.*

*-Málið er at arbeiða skjótt, gott og bíligt fyri harvið at fáa eina sunna fyritøku sigur Bjarti Mohr, stjóri í samrøðu við Tíðindablaðið Sosialin.*

Síða 10,11 og 12

# Trý seismisk skip arbeiða á Gráu leið



*Ikki færri enn trý stór og vælútgjørd rannsóknarskip, øll leigað av bretskum fyritøkum, gera nú seismiskar kanningar nærhendis Føroyum ella rættari á Gráu leiðini millum Føroyar og Bretland.*

Marinustøðin, sum hevur skerpað eftirlitið í økinum eftir hendingina fríggjadagin, tá Hvidbjørnen kom frá á eitt skip, sum uttan loyvi gjørdi kanningar á føroyskum øki, sigur nú, at teir hava sæð trý seismisk skip í økinum. Vit fáa ikki upplýst nøvnini á skipunum, men Sosialurin hevur upplýsingar, sum vísa, at talan er um Acadian Searcher, sum arbeiðir fyri Digicon Exploration Geophysical og tey bæði Pacific og Nordic Explorer, sum bæði arbeiða fyri BP.

Ovastin á Marinustøðini, Carsten Høgh sigur við Sosialin, at øll trý skipini hava útgerðina úti og arbeiða suður og norður eftir. Upp á fyrispurning um tey arbeiða saman sigur hann, at tað dugir hann ikki at siga. Men tey liggja rættuliga tætt upp at hvørjum øðrum. Flogfarið hjá sjóverjuni skuldi taka myndir av skipunum seinnapartin í gjár.

Vit spurdu Carsten Høgh, um tað bert er hesa seinastu tíðina, at sjóverjan hevur vist fremmandum skipum sum hesum ans. Til tað sigur hann, at teir havi slíkt eftirlit seinastu 2-3 árini. Teir hava kannað Gráu leiðina í minsta lagi eina ferð og oftani tvær ferðir um vikuna ta tíð hann hevur verið ovasti á støðini.

*-Hvat hava tit sæð til slík skip á leiðini hesi árini?*

-Tað er fyrst nú, at hesar kanningar hava tikið dik á seg.

Gráa leiðin millum Føroyar og Bretland er eitt sokallað ongamannaland. Óvist er hvat skip av hesum slag kunnu fyritaka sær á økinum og hvørjar avtalur annars eru galdandi. Sosialurin hevur fingið upplýst, at sambært avtalu millum føroyingar og bretar, skulu partarnir so vítt gjørligt siga hvørjum øðrum frá, tá slíkar kanningar verða gjørdar. Kjartan Hovdal, fiskivinnustjóri vísti í blaðnum leygardagin á, at bretar hava ikki sagt føroyingum frá hesum.

Árni Olafsson, leiðari í nevndini, ið samráðist við bretar um markið, sigur við Sosialin, at málið um hendingina sunnan fyri Føroyar fríggjadagin nú verður kannað. Í gjár skuldi hann vitja verjumálaráðið fyri at siggja frágreiðingina frá Marinustøðini. Óvist er um føroyingar í heila takið fara at mótmæla mótvegis bretum í hesum máli, ti menn eru í iva um, hvat er hent og um tað, sum er farið fram stríðir ímóti galdandi lógum og reglum.

Men hvat sigur stjórin á Marinustøðini til, at landsstýrið nú umhugsar ikki at mótmæla og gera meira við málið. Merkir tað so ikki, at hann hevur tikið eina skeiva avgerð, tá hann bað skipið rýma fyri harvið at fáa málið upp á hægsta politiska stig?

Carsten Høgh sigur, at teir hava sera haldgóð prógv um, hvat amerikanska skipið hevur gjørt og hvar. "Det er klingende soleklart og rent. Der er ingen rust på hånden. Det er indiskutabelt. Det er 100%" sigur marinuovastin.

*Men vildi tað ikki verið heilt natúrligt at sent bretum eitt mótmæli, tá tit nú hava sagt skipinum, at tað var ólógliga inni á føroyskum øki?*

-Her er bæði talan um politikk og so eina politisak um suverentitetsviðurskiftu. Eg havi fingið greið boð frá uttanríkisráðnum, hvørji mark eg skal ansa eftir. Men hvat ein politiski fer at gera, um onkur kemur um markið, er so ein spurningur um, hvørjar avtalur eru galdandi ella ikki og um støðan inni á føroyskum øki er at sammeta við Gráu leiðina. Hetta eru spurningar, sum politiski myndugleikin má taka støðu til.

Eg eri bert fegin um, at øll hesi skipini nú eru uttan fyri føroyska fiskimarkið, ti tey hava einki at gera innanfyri sigur Carsten Høgh.

jan

*Landsstýrið leggur uppskot á ting:*

## Startskotið til oljuleiting við Føroyar



Landsstýrið legði í gjár uppskot á ting um at landsstýrið fær heimild til at lata gera forkanningar við atliti til oljuleiting eftir og útvinning av ráevni úr undirgrundini.

Marita Petersen, løgmaður sigur, at hetta er fyri at landsstýrið fær lógarheimild til at kunna taka støðu til tær umsóknir sum liggja.

Sum er hava vit onga lógarheimild til forkanningar, og tað er hetta, sum landsstýrið nú biður løgtingið um.

tor.-

ROKDAGAR Á TORGINUM
MIKUDAGIN 1/9 HÓSDAGIN 2/9
FRÍGGJADAGIN 3/9 LEYGARDAGIN 4/9
eru vit úti á Torginumí erva í SMS við
HÓPIN AV NÓGV NIÐURSETTUM RESTUM!
Kom og ger kvettið!
DADDAN
SMS
TLF. 12138